VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin og leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri, seinnapartin nakað minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 14 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin hækkar hann upp í vestan. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landnyrðing og yvirhøvur turt.Hitin millum 7 og 10 stig. Týsdagin nakað minni vindur av landnyrðingi og ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.

Pól Hentze og Ludvík Petersen sýna fram í Smiðjuni

Pól Hentze og Ludvík Petersen hava listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík hesa vikuna. Framsýningin opnaði klokkan 14 í dag

Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

Pól Hentze sýnir fram í Smiðjuni í Lítluvík saman við Ludvík Petersen. Her vísir Pól myndamanninum hjá Sosialinum nakrar av málningunum hjá sær
Mynd: Høgni Thomsen

Pól Hentze hevur málað síðani hann var barn.

- Eg havi altíð teknað, og síðani eri eg eisini farin at mála. Tað hevur altíð havt mín áhuga. Í mínum dagliga yrki sum lærari arbeiði eg eisini nógv við slíkum í evning. Máling er mín stóri áhugi, og eg lesi nógvar bøkur um máling. Tað er eisini áhugavert at nýta somu teknikkir til at undirvísa í skriving. At skriva og tekna hongur saman. Børn síggja orð í myndum í fyrstani, sigur Pól.

Hann málar serliga landslagsmyndir, men hann fæst eisini við onnur evnir.

- Eg eri persónliga kristin, og tað ávirkar eisini málningarnar hjá mær. Mær dámar væl at mála landsløg, og eg síggi náttúruna sum nakað Gudgivið og Gudsinnblást. Eg máli eisini myndir við Jesusi á. Árstíðirnar hava hvør sín vakurleika. Serliga skiftini eru hugtakandi. Ljós og myrkur og skuggar upptaka meg nógv, sigur Pól.

Ludvík Petersen hevur eins og Pól málað alt sítt lív.

- Eg havi málað alt tað, eg kann minnast. Eg fari at sýna fram akvarellir. Bæði pastel og oljumálningar. Tað eru serliga landsløg, sum eg máli. Men eg havi eisini tekningar av fólkum. Málingin er mítt frítíðarítriv, og tað fer við nógvari tíð, sigur Ludvík Petersen.

Ludvík Petersen og Pól Hentze hava sýnt fram saman fyrr. Annars hava teir eisini havt fleiri framsýningar hvør sær.

Framsýningin verður opin hvønn dag millum 14-17 í eina viku fram.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	2
Qaqortoq	--
Ammassalik	0
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	8
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	10
Lerwick	12
Aberdeen	16
London	17
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	15
Keypmannah.	16
Helsinki	11
Moskva	11
Berlin	16
Warzawa	15
Kiev	10
Bukarest	15
Paris	17
Madrid	25
Róm	24
Malorca	25
Athen	--
Malta	23
Tunis	25
Beijing	17
New Dehli	33
Bangkok	30
Jakarta	33
Sydney	15
New York	20
Miami	30
Los Angeles	20
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	--
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	26

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágttrýst, 983 hPa. vestan fyri Skotland fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani fer um Føroyar hóskvøldið.



Í dag:
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer móti Íslandi og brúgvalagið norðan fyri Føroyar fer í útnyrðing.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 8/10 kl. 06^{00}– 9/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í oktober: - -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 8/10 kl. 06^{00}– 9/10 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

6. oktober	Mánin næstur jørðini
7. oktober	Fullmáni
14. oktober	Seinna kvarter
19. oktober	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
12. Okt	11.41	-	10.41	23.08	10.56	23.23	01.12	13.41	02.12	14.41	09.56	22.23	08.56	21.23	11.56	-	00.27	12.56	11.26	23.53	00.12	12.41
13. Okt	00.08	12.36	11.36	-	11.51	-	02.08	14.36	03.08	15.36	10.41	23.31	09.41	22.31	00.23	12.51	01.23	13.51	-	12.21	01.08	13.36
14. Okt	01.16	13.57	00.16	12.57	00.31	13.12	03.16	15.57	04.16	16.57	-	12.12	11.12	23.50	01.31	14.12	02.31	15.12	01.01	13.42	02.16	14.57
15. Okt	02.35	15.13	01.35	14.13	01.50	14.28	04.35	17.13	05.35	18.13	00.50	13.28	-	12.28	02.50	15.28	03.50	16.28	02.20	14.58	03.35	16.13
16. Okt	03.34	15.56	02.34	14.56	02.49	15.11	05.34	17.56	06.34	18.56	01.49	14.11	00.49	13.11	03.49	16.11	04.49	17.11	03.19	15.41	04.34	16.56

5 707265 100050 >